# Fiskaaling raðfestir gransking

**Tað er avgerandi at Føroyar granska innan aling, um alivinnan skal verða kappingarfør í framtíðini**

Í løtuni arbeiðir Fiskaaling við fleiri granskingarætlanum.

- Føroyska alivinnan hevur havt góð úrslit seinastu árini, men vinnan er lívfrøðiliga viðbrekin og hon er dagliga í harðari altjóða kapping. Tí er neyðugt at Føroyar granska innan aling, sigur Ingolf Joensen, stjóri á Fiskaaling.

Møguleikarnir at veksa um inntøkurnar hjá føroyska samfelagnum eru kanska eina mest ítøkiligir innan aling, havandi í huga, at vanligt fiskarí er hart troytt, og at flestu aðrar vinnur í Føroyum eru undir hørðum trýsti í altjóða kappingini.

Ì grannalondunum verður nógv orka brúkt uppá gransking innan aling, bæði innan almennar og lokalar avbjóðingar. Taka Føroyar ikki eisini taka lut í vinnugransking, fáa kappingarneytarnir tann marginala fyrimunin, sum gerð at alingin í Føroyum verður eftirbátur og til síðst ikki hórar undan.

Sum dømi um vakstrarmøguleikar, nevnir hann aling á meira harðbaldum økjum. Har eru nógvar avbjóðingar, men verða teknisku- og lívfrøðiligu forðingarnar loystar, eru stórir møguleikar fyri, at føroyska samfelagið, á ein burardyggan hátt, kann økja um inntøkurnar hjá Føroyum.

Fiskaaling fer framyvir at leggja áherðslu á granskingar- og menningarvirksemi innan aling í Føroyum. Framleiðslan av laksarognum steðgar, tí laksarogn partvíst verða innflutt og tí framleiðslukostnaðurin av rognum í einum lítlum lívfiskasystemið sum tí føroyska, er munandi hægri enn marknaðarprísurin.



## Føroyskir granskarar

Fiskaaling hevur 3 PhD-verkætlanir í gongd, umframt aðrar vinnuligar aliverkætlanir.

Verkætlanin »Fitisýran TTA í eini dynamiskari framleiðslu av atlantiskum laksi« skal kanna, hvussu ein dynamisk samansetíng av fóðri kann lagast til ymisk fysiologisk og umhvørvislig viðurskifti, fyri at tryggja eina optimala framleiðslu av alilaksi.

Henda verkætlan er partur av eini størri strategiskari verkætlan um optimering av laksaaling, og er fíggjað av Norges Forskningsråd. Regin Arge, granskari á fiskaaling, tekur hesa PhD-verkætlanina og er innskrivaður við Universitetet for Miljø- og Biovitenskap í Ås í Noregi.

Ein onnur verkætlan er »Ílegukanningar av toski av Føroyabanka og landgrunninum«, og hon skal lýsa genetiska strukturin í teimum báðum føroysku toskastovnunum, og skal varpa ljós á viðurskifti í sambandi við aling av føroyskum toski. Tað er Petra Petersen, granskari á Fiskaaling, sum tekur hesa verkætlanina, og hon er innskrivað við Institute of Aquaculture á University of Stirling í Skotlandi. Verkætlanin er føroyskt fíggjað og er eitt samstarv millum føroyskar og norskar stovnar.

## Kanna vatngóðsku

Nýggjasta PhD-verkætlanin hjá Fiskavirking nevnist »Vatngóðska innan aling á sjónum«, og skal kanna umhvørvið í aliringum á sjónum. Henda verkætlan er eitt samstarv millum Fiskaaling, Náttúruvísindadeildina, SINTEF í Noregi og føroysku alivinnuna.

Heini Rasmussen, sum í løtuni starvast hjá Haldor Topsøe A/S í Danmark við FEA-modellering, er settur í starv til PhD-verkætlanina. Hann er útbúgvin civilverkfrøðingur á maskinlinju frá DTU í Danmark og byrjar í nýggja starvinum á Fiskaaling um ársskiftið 2009/2010.

PhD-verkætlanin verður liðug í 2013 og úrslitini verða kunngjørd í altjóða granskingartíðarritum og á ráðstevnum. PhD-verkætlanin verður fíggjað av Fiskaaling, Granskingarráðnum og SINTEF.

Í nýggju verkætlanini verður arbeitt víðari við modellinum – sum Øystein Patursson menti í 2008, og sum modellerar rákið í og kring eina alinót – við denti á at fáa vitan um eitt heilt alibrúk við fleiri nótum. Harumframt er ætlanin at kanna ávirkanina frá fiskinum á rákið og súrevnisnøgdina í sjónum.

- Úrslitini frá verkætlanini vera týdningarmikil fyri framtíðaraling, bæði á innaru aliøkjum og á meiri útsettum aliøkjum, sigur Ingolf Joensen, stjóri á Fiskaaling.

